# NØVN

SAMBAND
MAGNUS GUNNARSSON
MAGGI@SOSIALURIN.FO
TLF 341800 FAX 341801

*Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.*

**Føðingar**
13. august fingu Helena og Mats Jørgensen, Århus, eina dóttir. Hon var 55 cm. long og vigaði 4230 gr.

24. august fingu Fríðbjørg Petursdóttir og Martin úr Fugloy Justesen, Hvannasund, ein son. Hann var 51 cm. langur og vigaði 3000 gr.

26. august fingu Rudi og Søren Bruhn, Trongisvágur, ein son. Hann var 54 cm. langur og vigaði 4640 gr.

26. august fingu Rannvá Augustinussen og Finn Johannessen, Vágur, ein son. Hann var 52 cm. langur og vigaði 3520 gr.

27. august fingu Elsa Olsen og Símin Esmar Vágsá, Klaksvík, ein son. Hann var 51 cm. langur og vigaði 3550 gr.

29. august fingu Agnetha og Búgvi Jacobsen, Nólsoy, eina dóttur. Honv ar 51 cm. long og vigaði 3300 gr.

30. august fingu Maj-Britt L. Olsen og John Olsen, Signabøur, ein son - Markus Tobias Lundsby Olsen. Hann var 55 cm. langur og vigaði 4480 gr.

31. august fingu Irdi og Valbjørn Mittelstein, Skopun, eina dóttur. Hon var 52 cm. long og vigaði 3675 gr.

31. august fingu Ingrid H. Skillicorn og Hildibjartur F. Olsen, Kvívík, tvíburar - 2 gentur. Onnur var 46,5 cm. long og vigaði 2500 gr. og hin var 47 cm. long og vigaði 2400 gr.

31. august fingu Kristgunn og Jákup Meinhard Jacobsen, Vestmanna, eina dóttur. Hon var 54 cm. long og vigaði 3700 gr.

31. august fekk Jancy eina lítlasystir, sum eitur Rakul, hon var 55 cm. long og vigaði 3800 gr. Foreldrini eru Lisa og Oslak Frederiksberg, Strendur.

31. august fingu Majbritt og Sveinbjørn Jakobsen, Tórshavn, ein son. Hann var 50 cm. langur og vigaði 2925 gr.

1. september fingu Marita D. Magnussen og Knút Lützen, Tórshavn, ein son. Hann var 52 cm. langur og vigaði 3220 gr.

1. september fingu Lív og Signar Vilhelmsen, Sandavágur, ein son. Hann var 50 cm. langur og vigaði 3000 gr.

2. september fingu Mona Egholm og Petur Müller, Kvívík, eina dóttur. Hon var 55 cm. long og vigaði 4200 gr.

2. september fingu Anna Elisabeth Joensen, Miðvágur og Benjámin Lydersen, Skálavík, eina dóttur. Hon var 49 cm. long og vigaði 3680 gr.

2. september fingu Gurið Joensen og Jónsvein mortensen, Hoyvík, eina dóttur. Hon var 53 cm. long og vigaði 3600 gr.

3. september fingu Ioana og Daniel Rapa, Vestmanna, eina dóttur. Hon var 56 cm. long og vigaði 3800 gr.

4. september fingu Miriann og Annfinn Fagraklett, Norðragøtu, ein son. Hann var 57 cm. langur og vigaði 4600 gr.

4. september fingu Kristina Højgaard og Aleksandar Volfart, Glyvrar, eina dóttur. Hon var 50 cm. long og vigaði 3300 gr.

4. september fingu Haidi Blástein og Arne Olsen, Tórshavn, ein son. Hann var 50 cm. langur og vigaði 2800 gr.

5. september fingu Una og Christian V. Dalsgaard, Hoyvík, eina dóttur. Hon var 54 cm. long og vigaði 3420 gr.

5. september fingu Tanda Anthoniussen og Arnhold S. Simonsen, Fuglafjørður, ein son. Hann var 55 cm. langur og vigaði 4500 gr.

# Esther Kruse farin



Hósdagin 31. august andaðist Esther Kruse 89 ára gomul. Hon varð borin til gravar úr Eiðis kirkju síðsta sunnudag. Esther var ljósmóður á Eiði í 20 ár og síðani í Havn í 16 ár. Tey eru sjálvandi mong, sum komast við ljósmóðrina, sum tók móti umleið 4500 børnum tey 36 árini, sum hon arbeiddi.

Esther var fødd 6. juni í 1917, og hon var ættað av Eiði. Foreldrini vóru Elsebeth Marie og Joen Peter Ejdesgaard í Garði. Tey fingu seks børn: Hans Jacob Eiðisgarð á Eiði, Anna Poulsen í Saksun, Esther Kruse, John Ejdesgaard á Eiði, Jóannes Ejdesgaard í Noregi og Petur Martin Ejdesgaard á Eiði. Jóannes og Petur Martin eru framvegis á lívi.

Esther giftist í 1942 Thorleifi Kruse av Eiði. Hann var sonur Jacobinu og Niels Kruse. Niels var ein av fyrstu listarmálarunum í Føroyum. Thorleif var fiskimaður, og hann hevði gingið upp á skúla og hevði aftur verið til skips, tá ið hann upp undir jól í 1943 – nakrar fáar dagar eftir at yngra dótturin var fødd – varð innlagdur í Hoydølum, tí hann hevði fingið tuberklar. Hann kom ongantíð fyri seg aftur og doyði 5. august í 1946 knappliga 31 ára gamal.

Esther og Thorleif fingu tvær døtrar: Jacobina Nørgaard, sum býr í Keypmannahavn, og Elseba Dahl, sum býr á Oyri.

Eiðislæknin, dr. Rasmussen, stuðlaði Esther at fara at læra til jarðamóður, tí hann dugdi at síggja, at tað fór at verða tørvur á ljósmóður á Eiði. Hetta var undir krígnum, og tað slapst tískil ikki millum lond. Esther var tí á hospitalinum í Havn, inntil kríggið var av. Tá fór hon til Keypmannahavnar at læra. Hon plagdi at siga frá ringu ferðini niður við Kyrjasteini.

Tá ið maðurin var viknaður heilt nógv, var hon heima í eitt hálvt ár. Eftir at hann var deyður, fór hon niður aftur at gera seg lidna við útbúgvingina, og í november 1948 gjørdist hon ljósmóður á Eiði. Har var hon inntil í 1967, tá ið hon flutti til Havnar, og har arbeiddi hon, inntil hon 66 ára gomul fór úr starvinum. Í eitt ár – 1961-62 – var hon í Keypmannahavn, har hon arbeiddi á føðiklinikkini, sum Astrid á Rógvi átti í Søborg.

Esther hevði latið hús byggja á Eiði, og hon flutti aftur í heimbygdina, tá ið hon var givin at arbeiða. Seinnu árini var hon tó nógv hjá døtrunum. Í november 2004 flutti hon í Korndalsbýlið á Eiði at búgva, og har var hon, inntil tað nú vóru boð eftir stillføru og róligu jarðamóðrini, sum við síni medferð og fakliga dugnaskapi var orsøk til, at konurnar, sum hon hjálpti, kendu seg at vera í tryggum hondum.

Esther var 29 ára gomul, tá ið hon misti mannin, og nú hevði hon sitið einkja í 60 ár. Tær báðar døtrarnar eiga seks børn, og í næsta ættarliðnum eru níggju komin.

**J**

# Arni Vatnhamar 85 ár



10. september verður Arni Vatnhamar í Leirvík 85 ár. Arni er leirvíkingur, sonur Absalon Vatnhamar (Absalon hjá stóra Jákup) úr Leirvík, og Sannu Fr. Andreasen, ættað av Frælsinum í Havn. Tey fingu 8 børn.

Arni fór til skips sum mangir aðrir, eftir at hann hevði fingið prestsins hond á høvdið. Fyrsta túrin fór hann saman við pápa sínum við Fossanesi - miðskeiðis í trýatiárunum.

Í 1938 varð Arni fyri tí vanlagnu at missa pápan við Fossanesi. Arni skuldi sjálvur verið við, men av onkrari orsøk slapp hann ikki við hendan vanlukkutúrin. Her endaðu ungdómsárini hjá Arna, hann kom nú í faðirs stað.

Í 1943 giftist Arni ungari gentu úr grannabygdini, gentan var Ninna Hansen, dóttir Andreas og Martinu úr Syðrugøtu. Tey búsettust við Gráastein í Leirvík. Heim teirra var eitt fyrimyndarligt heim, har nógv fólk gjøgnum árini hava komið inn á gólvið til eitt hugnaligt prát og ein góðan drekkamunn.

Hjúnalagið bar frukt við 8 børnum, 4 dreingjum og 4 gentum, tey eru: Óla Jákup, Absalon, Miriam (Mouritsen), Arnborg (Lervig), Andreas, Sólmai (Johannesen), Berg og Eyðvør. Absalon og Andreas búgva í Danmark og Miriam býr í Havn, hini búgva øll í Leirvík. Eisini eru við abba- og langabbabørnini hjá Arna nógv í tali.

Miðskeiðis í sekstiárunum fluttu tey bæði til Havnar við tveimum teimum yngstu børnunum. Arni arbeiddi sum umsjónarmaður á Skúlanum á Trøðni og Ninna sum fyristøðukvinna á skúlaheiminum, ið var knýtt til skúlan. Í 1991 fluttu tey bæði norður aftur til Leirvíkar. Ninna doyði í 1996.

Arni hevur verið sera virkin innan fyri missiónshúsið í Leirvík og trúgvur kirkjugangari. Hann er sera fittur í hondunum og mangur vakur trælutur, sum hann hevur latið úr hondunum, prýður heimini hjá slekt og vinum.

Fótbólturin hevur altíð haft hansara stóra áhuga, og LÍF er hjartabarn hansara. Hann hevur í fleiri tíðarskeið verið formaður í felagnum og annars verið felagnum ein hollur stuðul.

Góði pápi, hjartaliga tillukku við 85 ára føðingardegnum við ynskjum um eitt friðsælt lívskvøld.

Føðingardagurin verður hildin í missiónshúsinum í Leirvík leygarkvøldið 9. september kl. 19, har øll eru vælkomin.

**Børnini**